


# Valblað í Sosialinum valdagin

Í týsdags-Sosialinum – blaðnum, sum kemur á gøtuna mánadagin seinnapartin, fara vit at prenta eitt serligt valblað sum innlegg í Sosialinum. Hetta gera vit, tí okkum tørvar pláss til alt valtilfarið og, tí hetta eisini gevur okkum møguleikan at hava tilsamans 32 síður í litum hendan dagin.

Vit bjóða hervið flokkum og valevnum greina- og lýsingarpláss í hesum blað, sum eisini fer at hýsa øðrum tilfari, so sum redaktionellum tilfari, Tinghelluni, har samfelagsfrøðingar o. o. hugleiða um valið, eins og vit eisini prenta valtalvuna, so fólk kunnu fylgja við, tá Útvarpið og Sjónvarpið koma við valúrslitinum valkvøldið.

- Evstamark at fáa lýsingar í hetta blað er fríggjadagin 16. januar kl. 16:00
- Pláss er fyri litlýsingum á 16 síðum og sv/hv lýsingum í upp til 40 síðum
- Evstamark fyri valgreinum er sunnudagin 18. januar kl 14:00
- Valgreinar skulu sendast sum teldupostur til post@sosialurin.fo, og tær skulu verða rættlisnar
- Prísir á lýsingum og valtilfari eru teir somu, sum í vanliga Sosialinum

Ringið og bíleggið pláss á 341 800 og biðið um Lýsingardeildina. Hittast eisini á 223 369 og 229 044




HESTPRENT - TEL. 314 555





Millum búfólkini er eisini landsins elsti íbúgvi, Anna Askham, sum er 102 ár. Hon valdi sum hon hevur gjørt øll undanfarin ár.

Landsins elstu valdu á Ellisheiminum:

# –Hugsið um tey gomlu

VAL

*Krisjan Andersen*
*Jan Müller*

Mikudagin stukku umboð frá Tórshavnar Býráð inn á gólvið á Ellisheiminum í Havn. Orsøkin var, at tey gomlu skuldu seta sína atkvøðu til løgtingsvalið týsdagin. Av teimum 24 á heiminum valdu tey 17, tey flestu kvinnur. Miðalald - urin á veljarunum var oman fyri 90 ár, og elsti veljari var 102 ár. Sosialurin fekk sær eitt lítið prát við nøkur av eldru veljarunum og spurdu vit tey m.a., hvørji eru týdningarmestu málini at arbeiða við hjá nýggja tinginum!

**Astrid Joensen, 92 ár:**
– Eg vóni, at teir politikkarar, sum koma til, fara at syrgja fyri, at vit gomlu fáa tað so gott sum yvirhøvur gjørligt. Eg velji tað sama, sum eg altíð havi gjørt.

**Annelin Thomassen, 85 ár:**
– Teir politikkarar, sum koma í samgongu nú, mugu royna at fáa ordan á øllum hesum ruðuleikanum, sum valdar nú. Tað er stórliga brúk fyri tí. Tann flokkin, sum eg velji nú, havi eg altíð valt.

**Olaf Johan Olsen, 93 ár:**
– Eg havi altíð valt samband, og tað fari eg eisini at gera hesaferð. Og eg vóni, at teir fara at koma til og gera júst tað øvugta av tí, ið Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt.

**Jóhanna Matthea Skaale, 97 ár:**
– Har er so nógv at taka hond í hjá teimum politikkarum, sum nú koma í samgonguna. Har sær ikki so gott út í løtuni. Eg velji ikki tað sama í dag, sum eg plagdi fyrr.

**Anna Askham, 102 ár:**
– Okkara familja hevur altíð valt sambandið, og tað geri eg eisini.



*Ein stórur partur av búfólkunum á Ellisheiminum í Havn vildi sleppa at velja til løgtingsvalið, tá umboð fyri valnevndina vitjaðu mikudagin.*



*Tey bíða eftir tørni at skula velja*



*Loyniligt val á Ellisheiminum*